








# *The Pier* *við møblum og gávulutum*

**Nýggi handilin The Pier við gávulutum og møblum er latin upp í Havn. The Pier er ein handil í samtakinum hjá Jákupi á Dul, sum heldur til við Smyrilsvegin.**

Handilin heldur til stóra í handilsbygninginum á Smyrilsvegi 7 millum Dadduna og BR-Leikur.

Talan eru um ein handil við møblum og gávulutum sum t.d. pútum, ljósum, smyrsli, koppastellum, økologiskum te og kryddaríum. Eisini fæst nógv litfagurt orientalskt í t.d. kinesiskum og indiskum stíli.

The Pier hevur eisini ymisk sløg av kremi sum t.d. deyðahavskrem, sum er so at siga reint og væl egnað til sárbara húð.

The Pier er ein amerikonsk handilsketa við yvir 1100 handlum kring um í heiminum. Jákup á Dul hevur til fyri tveimum árum síðan havt 50 The Pier handlar í Onglandi, sum allir nú eru seldir.

Handilsleiðari í The Pier er Steinar Hansen, sum hevur drúgvar arbeiðsroyndir á økinum. Hann arbeiddi í sjey sum innkeypari av møblum til handlarnar hjá Jákupi á Dul í Kanada, síðan var hann tvey ár í The Pier handlum í Onglandi.

Steinar Hansen sigur, at handilin í Havn er ein spennandi avbjóðing. Vøruúrvalið er stórt, og fólk hava tikið væl undir við handlinum, síðan hann læt upp fyri góðum tveimum vikum síðan.




